Fiskimálaráðið
Lønjavningarstovan

Roknskaparfólk

Lønjavningarstovan søkir hervið eftir einum roknskaparfólki til setan skjótast gjørligt.

Lønjavningarstovan er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum.

Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:
- At røkja roknskaparligar og bókhaldsligar uppgávur herundir innan- og uttanhýsissamskifti á økinum
- At gera fíggjarætlanir
- At hava um hendi játtanareftirlit og innanhýsis eftirlit
- At fyriskipa og samskipa menningina av edvskipanunum á deildini
- At gera konsekvensútrokningar í sambandi við lógarsmíð
- Luttøku í tvørgangandi arbeiðsuppgávum í Fiskimálaráðnum.
- Aðrar fyri økið fyrifallandi uppgávur

Førleikakrøv:
Til starvið krevst:
- HD, HA ella líknandi útbúgving innan roknskaparliga økið
- Góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum máli
- Hollan telduførleika og kunnleika til búskaparskipanir
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni
- Starvsroyndir innan líknandi starvsøki er ein fyrimunur

Setanartreytir:
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini ráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Lønjavningarstovan.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Lønjavningarstovuni í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 27. september 2002 kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:

Fiskimálaráðið
Lønjavningarstovan
Postsmoga 347
110 Tórshavn

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Fiskimálaráðið á tlf. 353030 og tosa við Hildibjart Johansen, deildarstjóra ella Mary J. í Garði, fíggjarfulltrúa.

Oljumálaráðið

Fulltrúi til útjaðaramál og lendisskipan

Við hesum verður eitt starv sum fulltrúi í Oljumálaráðnum lýst leyst at søkja. Gjørt verður vart við, at líknandi starv varð lýst leyst á Løgmansskrivstovuni í vetur. Umsøkjarar, ið lótu inn umsókn um tað starvið, mugu søkja av nýggjum, tí starvsuppgávurnar eru broyttar nakað, eftir at útjaðaramál vórðu flutt til Oljumálaráðið at umsita.

Uppgávur
Høvuðsuppgávan verður at samskipa útjaðarapolitikk landsstýrisins og at arbeiða víðari við eitt nú teimum tilmælum, ið vóru løgd fram í Øksmenningarálitinum og Útoyggjaálitinum. Harumframt skal fulltrúin taka sær av málsviðgerð á byggi- og býarskipanarøkinum umframt at taka lut í arbeiðinum at dagføra lóggávuna á hesum øki.
Talan er um eitt fjølbroytt og krevjandi starv við nógvum avbjóðingum.

Faklig førleikakrøv
Umsøkjarar skulu hava viðkomandi útbúgving. Umsøkjarar við royndum á starvsøkjunum kunnu hava fyrimun.

Persónlig førleikakrøv
Umsøkjarar eiga at hava góð samstarvsevni, vera fyritakssamir, kunna arbeiða sjálvstøðugt, og vera til reiðar at ganga nýggjar leiðir.

Løn og setanartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Oljumálaráðið við tilhoyrandi stovnum og miðfyrisitingina.

Nærri upplýsingar um starvið
Umsøkjarar eru vælkomnir at seta seg í samband við Oljumálaráðið á tlf. 357070 og tosa við Rók Tummasarson, deildarleiðara fyri at hoyra meira um starvið.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum, C.V. og møguligum viðmælum skulu sendast til:

Oljumálaráðið
Postsmoga 3059
FO-110 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 11. oktober 2002. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Starvið verður sett skjótast til ber.

Oljumálaráðið er skipað undir landstýrismanninum í olju- og umhvørvismálum. Ráðið umsitur kolvetnismál, jarðfrøðilig mál, orkumál, umhvørvismál, havumhvørvismál, náttúrumál, skógarrøkt, lendisskipan og útjaðaramál. Uppgávurnar hjá ráðnum fevna um lógarsmíð, loyvisveitan, eftirlit, kæruviðgerð o.a. á hesum økjum.

Øll hava eina góða síðu – pop.fo hevur 100

Hesi hava vunnið á 40 ára føðingardegi okkara leygardagin 7. sept. 2002:

Sofasett kr. 25.000
Alfred Poulsen, Ovarivegur, 350 Vestmanna

Gávukort kr. 14.000
Ása Hansen, Perskonugøta 17, 100 Tórshavn
Kaj Niclasen, Pedda við Steingøta 20, 100 Tórshavn

Gávukort kr. 3.000
Marianne Gjoveraa, Varðagøta 25, 100 Tórshavn
Martha Hammer, Marknagilsvegur 38, 100 Tórshavn
Haidi Poulsen, Ovaragøta 60, 188 Hoyvík
Paulina Jonassen, Dr. Jakobsensgøta 7, 100 Tórshavn
Eyðbjørg Glerfoss, Kráargøta 12, 160 Argir

Gávukort kr. 1.000
Elsa Grønagarð, Láarvegur 2, 100 Tórshavn
Jan Kjell Jacobsen, Handan Á 17, 100 Tórshavn
Meiken Justinussen, Sóljugøta 7, 100 Tórshavn
Beinta Klakkstein, Undir Fossum 85, 700 Klaksvík
Edelborg Petersen, 440 Haldórsvík
Kristin Gærdbo, Eysturstræti 18, 100 tórshavn
Ásla Joensen, J. Nolsøesgøta 26, 100 Tórshavn
Martin Syderbø, Fugloyarvegur 6, 100 Tórshavn
Hervør Dam, Spógvavegur 37, 100 Tórshavn
Niels Trolle, Bóndabrekka 9, 100 Tórshavn
Finnur Rubeksen, Undir Gráasteini 74, 100 Tórshavn
Anna Maria R. Jensen, Millum Gilja 79, 188 Hoyvík

Vinarligast
LITAVAL P/F

Til Hvannasunds kommunalu Dagrøktarskipan verður við hesum søkt eftir:

Dagrøktara

At byrja 1. oktober 2002 ella skjótast gjørligt.

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum FKA og Føroya Arbeiðarafelag.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Gunvør Eliasen á telefon 226360.

Umsóknir verða at senda til: Hvannasunds kommunu, 740 Hvannasund

og skulu verða kommununi í hendi **í seinasta lagi 20. september 2002.**

Hvannasunds kommuna

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3180, Sp/f Hellisendi, 700 Klaksvík.

Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Hildebrand Andreassen, Bumshamarsvegur, 700 Klaksvík.
Innkomin sum stjóri: Óli Hans Johannesen, Garðsvegur, 700 Klaksvík.

Skráseting Føroya tann 12. september 2002

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2466, P/F Klaksvíkar Sleipistøð, 700 Klaksvík.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Heini Olivur Heinesen, Vágsheygagøta 27, 700 Klaksvík.
Innkomin í nevndina: Leif Mohr, Undir Brúnni 27, 700 Klaksvík.

Skráseting Føroya tann 12. september 2002

Kristin Balle

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

FORD FIESTA 1.8 DIESEL
árg. 3/96 er í góðum standi. Fá nærri at vita um bilin við at ringja.
Tlf. 311950 ella 211950

TOYOTA STARLET 1.3
til sølu. Bilurin hevur 5 hurðar, er skrásettur 10/96 og hevur koyrt 60.500 km. Prísur 65.000 kr.
Tlf. 219597

FELGUR
við heilársdekkum og skálum til sølu. Passa til Citroen Xantia og BX. Stødd 185/65 R14.
Tlf. 333115 ella 218115

DEKK TIL SØLU
4 stk. Pirelli summardekk 175/65-R14 til sølu – lítið brúkt.
Tlf. 218101

TIL SØLU
Ford Sierra 1.8 turbo diesel, árg 91, sýnaður okt. 01, hevur sóltak og vel, radio bandspælari, sær væl út. Motorurin nýliga renoveraður.
Tlf. 218494 eftir kl. 17

FELGUR
til VW Golf til sølu fyri 900 kr.
Tlf. 225398

TIL SØLU
16" OZ sportfelgur – 4 hol – passa til Nissan. Einans 2.500 kr.
Tlf. 371484 ella 253184

TOYOTA CARINA 1.6 XLI
árg. 92 til sølu. Bilurin hevur alufelgur, spoylara, sleipikrók og startsperru. Hevur koyrt 163.000 km, sær sera gott út. Prísuppskot 60.000 kr.
Tlf. 373437 ella 254971

PEUGEOT 306 XL TIL SØLU
árg. 7/96, koyrt 83.000 km, til sølu.
Tlf. 258500

PEUGEOT 406
árg. sept. 98, 2.0 138 HK, 65.000 km.
Tlf. 371484 ella 253184

VØRUVOGNUR TIL SØLU
VW Transporter, árg. 96, bíliga til sølu. Bilurin er í sera góðum standi, og hevur takboylar og sleipikrók. Nýggj dekk framman, útstoyt, startari, bremsuklossar og akkumolator eru skift. Vælegnaður sum arbeiðsbilur hjá handverkara, ella til vørukoyring.
Tlf. 211349

BILUR YNSKIST
Bilur ynskist fyri umleið 5.000 kr.
Tlf. 320603 eftir kl. 17

COROLLA 2.0 DIESEL
árg. 7/96, við 15" sportfelgum + pikadekk á felgum,cd spælara v.m. í góðum standi, bíliga til sølu.
Tlf. 226022

FORD MONDEO 1.8 AIR
Turbo Diesel til sølu. Árg. sept. '99. Koyrt 78.000 km. Hevur krók, nýliga rustviðgjørdur.
Tlf. 213695

VOLVO FL 614
Árg. '87 og ein Bobcat 2,5 tons minigravimaskina árg. '95 til sølu saman ella hvør sær.
Tlf. 213577

COROLLA 2.0 DIESEL
Árg. 7/96 við 15" sportfelgum + pikadekk á felgum, cd-spælara v.m. í góðum standi, bíliga til sølu.
Tlf. 226022

TIL SØLU
Citroën AX GT 1.4 sýnaður í mars, 120.000 km. Gott Sony-anlegg + tveir Pioneer hátalarar. Einans 12.000 kr.
Tlf. 223256

VW POLO COUPÉ
Árg. '89, koyrt 145.000 km til sølu fyri 12.000 kr. Bilurin er sýnaður í august 2002.
Tlf. 216999 og 332224

2 ÁRA GAMAL OPEL VECTRA TIL SØLU
Hevur 2,5 V6 motor 170 hestar. Er nýlakeraður og hevur leðurkabinu. Koyrt 50.000 km, kann siggjast á heimasíðuni: bil.fo.
Tlf. 373745 og 004522217417

OPEL KADETT
Árgang 1987, til sølu sum eykalutir.
tlf. 313520

VW GOLF TURBO DIESEL
árg. 86, í sera góðum standi til sølu, góð pikadekk fylgja við.
Tlf. 448198 ella 218198

TOYOTA CAMRY SV21 2.5 V6
árg. 87, krevur onkrar ábøtir, til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 312880 ella 251158

OPEL ASCONA 1,6
frá 86, sýnaður seinast í 2001, til sølu fyri 6.000 kr. Bilurin koyrir væl. Hevur ikki nr-plátur.
Tlf. 282688

FORD SCORPIO 2.8i GHIA
árg. 85, sýnaður 3/2002, í góðum standi, til sølu. Nógvir eykalutir fylgja við.
Tlf. 442151 - 256133

SAAB 9000
árg. 87, aut. gear, sóltak, leðursetur, bíliga til sølu.
Tlf. 219520 ella 312850

TIL SØLU
Mitsubishi Galant, árg. 91, hevur el-rútavindara og sóltak, sentrallás, fartpilot, 17 tumma sportsfelgur og fløguspælara.
Tlf. 445012 ella 258312

BILUR BÍLIGA TIL SØLU
Chevrolet Monza, árg. 92, bíliga til sølu.
Tlf. 456204

TIL SØLU
Nissan Sunny 1,4 LX árg. 92, koyrt 157.000 km. Er sera væl hildin.
Tlf. 251221 eftir kl. 17

MITSUBISHI COLT
árg. 88, 1.6 diesel, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 458042 ella 265424

TOYOTA LANDCRUISER 4.2 D
vøruvognur, kann umskrásetast til persónvogn í nov. koyrt.170.000 km. Kr. 160.000,-
Tlf. 217040

MAZDA 323 1.3
árg. 97, koyrt 92.000 km, sýnaður í 2002, hevur 2 hurðar, lítil tryggingarskaði fylgir við. Prísuppskot: 55.000 kr.
Tlf. 224185

HONDA CIVIC 1.5i
Vtec-E, árg. 96, 16" sportfelgur + eyka sportfelgur, el-rútar framman, el-sóltak, el-spegl, nýsproytaður í apríl mánaða í ár, hevur koyrt 83.000 km.
Tlf. 222610

OPEL CORSA 1.2
árg. 96 við stórum skaða til sølu fyri 7.000,- kr.
Tlf. 227922

EYKALUTIR
til Mitsubishi Pajero til sølu.
Tlf. 227922

EYKALUTIR TIL NISSAN
Patrol, árg. 87, til sølu.
Tlf. 223021

MITSUBISHI GALANT 2.0
Ein Mitsubitshi Galant 2,0. hevur elektroniskan rútavindara, sóltak, fartpilot, fløguspælara,17" sportfelgur, umframt tveir smærri tryggingarskaðar, til sølu fyri sámuligan prís.
Ring 445012 ella 227239

BILUR TIL SØLU
Ein vínreyður Honda Civic, árg. 91. 1.6 VTec, 170 HK, alufelgur og el-rútar til sølu um høskandi boð fæst. Áhugaði kunnu ringja
Tlf. 250992 - 260619

CITROËN BÍLIGA TIL SØLU
Nýsýnaður, í góðum standi, sportfelgur, sleipikrók, einki rustaður, pikadekk á felgum fylgja við. Árg. 92. Prísuppskot 25.000 kr.
Tlf. 310774 - 261427

TOYOTA COROLLA CE 90 TIL SØLU
st. car, árg. 8/89, diesel, góðkendur í sýni mai 02, koyrt 190.000 km.
Tlf. 224411

STOYPJARNSKETIL
Salamander til fast brenni og oljufýr til sølu fyri 700 kr.
Tlf. 315072 / 264334

Amboð

TIL SØLU
2-soylu billyftari, er defektur, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 218778

TVEIR MANUELLIR
útskjótarar til ein Palfinger PK 16000 lastbilkrana ynskjast til keyps.
Tlf. 281134 ella 332909

SLÁIMASKINA
Ein Teilbürger T55 bíliga til sølu. Áhugað ringi
Tlf. 223527

Arbeiði

SØKT VERÐUR EFTIR
álítandi gentu at ansa 9 ára gomlum drongi og 10 ára gamlari gentu, mánakvøld og seinnapart leygardag. Áhugaði ringið
tlf. 319915, Randi

MAÐUR
søkist at koyra kranabil.
J. S. Bilar, tlf. 311655

AU-PAIR Í DK
Vit søkja eftir eini au pair gentu at byrja beinanvegin. Tú skalt passa trý børn (12, 7, 5) og gera húsarbeiði. Vit búgva í Græsted í Norðursjællandi.
Sólrun og Lars 0045 39481277 og 0045 21659015

MAÐUR
søkist til verkstaðið.
J. S. Bilar, tlf. 311655

ARBEIÐI SØKIST
20 ára gomul genta søkir arbeiði. Vinarliga ring á tlf. 260434 skjótast gjørligt.
Tlf. 260434

SPENNANDI STARV
sum fritíðar ella heiltíðar forhandlari. Í samband við at vit skulu lata upp nýggja deild í Føroyum, søkja vit eftir fólki, ið eru áhugaði at arbeiða sum sjálvstøðugur forhandlari. Ring vinarliga á
tlf. 373496, spyr eftir Petur Jacobsen

ARBEIÐI SØKIST Í HAVN
18 ára gomul genta søkir vaskiarbeiði ella okkurt tilikt eftir skúlatíð, t.v.s. e. kl. 16.00. Hevur tú arbeiði til mín, ring
Tlf. 224198, Helena

ALT
innan húsasmíð.
Tlf. 220387 ella 361977

HÚSASMÍÐ OG UMVÆLING
Alt timburarbeiði verður gjørt, nýtt sum gamalt innan og uttan. Fa. Húsaumvæling,
tlf. 215214

Barnaútgerð

BILSTÓLUR TIL SØLU
(0-13 kg.) fyri 500 kr. Bert brúktur til eitt barn, sær út sum nýggjur.
Tlf. 313045 ella 254069

SIMO KOYRISTÓLUR
3 mðr. gamal svartur/gráur koyristólur til sølu fyri 1.800 kr. Hann hevur aluminium stell og lufthjól.
Tlf. 312730

TVILLINGAVOGNUR
Kombineraður tvillingavognur av merkinum Trille við Z babylyftum og 2 soviposum. Hann er ógvuliga lítið brúktur og er uml. 4 mðr. og kostar 6.000 kr.
Tlf. 361813 ella 263613

YNSKIST TIL KEYPS
Brúktur barnavognur, minimum 96 cm. langur.
Tlf. 311327

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Barnavognur keyptur úr Skemmuni, svartur/hvítur, babylift, puslitaska fylgir við, til sølu fyri 1.200 kr.
Tlf. 448251

TIL SØLU
1 babysittari og ein hoppigynga.
Tlf. 448176

TIL SØLU
Svørt Brio babylift 700 kr. Chicco bilbarnastólur 0-13 kg. 500 kr. Brio Snugli posi 300 kr.
Tlf. 310455

TREMMUSONG TIL SØLU
Hvít, træ, selist fyri kr. 400,- við madrassu.
Tlf. 445148

GRØNUR BARNAVOGNUR
av merkinum Simo við puslitasku, regnslagi og fluguneti til sølu fyri 2.500 kr. Alt er sera væl hildið.
Tlf. 261435

BARNAVOGNUR
Myrkagrønur Brio barnavognur við babylift og puslitasku til sølu. Bert brúktur til eitt barn.
Tlf. 316420

VØGGA
ynskist til keyps.
Tlf. 223035

TRIP-TRAP STÓLUR
ynskist til keyps.
Tlf. 310209 ella 258172

TIL SØLU
Maxi Cosi bilstólur, 0-10 kg. Skrástólur. Systkinasetur at seta á vogn. Kenguruposi (Baby Dan).
Tlf. 314797

Bátaútgerð

TIL SØLU
Um høskandi boð fæst, verður ein 27 fót »Myra« glastrevjabátur seldur. Báturin ið hevur ein MD40 Volvo Penta 6 syl. 95 hk., er væl útgjørdur við fýra automat. elsnellum, hydrauliskum línuspæli, radara, ekkoloddi, kortplottara, sjálvstýrara og gummibjargingarbáti.
Tlf. 214246

NEYST Í VÁGI TIL SØLU
um høskandi boð fæst.
Tlf. 373995 ella 226833

BÁTAMOTORUR
Volvo Penta MD 30 62 HK við hydrogeari, sliriventili, aksli og skrúvu.
Tlf. 312954

YNSKIST
Bátur ynskist til keyps. Sómi ella líknandi. Skal vera í góðum standi og ikki er neyðugt við fiskiloyvi.
Tlf. 315509 ella 243001

PÁHANGSMOTORUR
Evinrude 8 HK Jacttwin – tann longri. Brúktur ca. 15 timar, í allarbesta standi.
Tlf. 317666 ella 313666

8-MANNAFAR TIL SØLU
8-mannafar til sølu, 22 HK Saab.
Tlf. 221913 ella 322762

TIL SØLU
4-mannafar til sølu.
Tlf. 421544 ella 254112

FØROYSKUR BÁTUR
Eiga tygum eitt frambygt 10-mannafar ella seksæring í góðum standi, ikki ov gamalt, við motori, men uttan fiskiútgerð? Prísur: Í mesta lagi kr. 50.000,- Vinarliga, sig mær frá!
Tlf. 219515

BÁTAMOTORUR
Ein 80 HK Mercedes bátamotorur við geari og skrúvu til sølu. Motorurin er nýhøvuðsumvældur. Nærri upplýsingar fáast á
Tlf. 315106 ella 312393

Bingo

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í Framtíðini onsdagin 18. sept. kl. 19.30. Full pláta 300 kr. Á lutaseðli m.a. lamb og 500 kr. Eykaspæl verður.
Felagið Stóra Pakkhús

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu 23/9 kl. 19.00. 15 plátur 100 kr. 15 vinningar á lutaseðlinum. Høvuðsvinningur: føroyskt neytakjøt pakkað í portiónir, virði 2.000,00 kr.
Astma- og Allergifelagið

HALDÓRSVÍKAR AVHALDSFELAG
hevur bingo mikukvøldið 18. sept. kl. 19.00.
Nevndin

GOTT BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum hósdagin tann 19. sept. kl. 19.00. Nógvir góðir vinningar. 6. og 12. spæl balja full av mati, millum annað á lutaseðli 500 kr. Gávukort og hjólbørа full av mati. Eykaspæl, koyring heim, 15 plátur 100 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
AB-studlar

HEY SUÐUROYINGAR!
Vit broyta okkara bingo til mánakvøldið 16. sept. kl.19 í skúlahøllini í Trongisvági
Tvøroyrar Svimjifelag

KAGGIN
Gott bingo verður leygarkvøldið 14. sept. kl. 19.00. 15 vinningar á lutaseðli, m.a. trý før. krov. Eisini verður spælt bingola og 20 kr. spæl. P.S. Spælt verður við blokkum (12 spøl).
Kaggin

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 15. sept. kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1.000 kr. Eykaspælið 1.600 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Plogg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:.....
Bústaður:.....
Bygd/býur:.....
Tlf.: .....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki